

## Reyði Krossur harmast mismun

Reyði Krossur heldur, at afghanar og hermenn hjá teimum útlendsku deildunum í Afghanistan skulu hava somu atgongd til at fáa viðgerð á hernaðarsjúkrahúsunum í landinum. Viðmerkingin kemur, eftir at ein talsmaður fyri donsku deildirnar í Afghanistan hevur sagt, at viðgerðin á hernaðarsjúkrahúsunum er ymisk, alt eftir hvør sjúklingurin er. Anders Ladekarl, sum er aðalskrivari hjá danska Reyða Krossi, fegnast um, at afghanar fáa viðgerð á teimum útlendsku hernaðarsjúkrahúsunum, men hann sigur tað vera skeivt, at teir útlendsku hermenninir verða tiknir fram um teir afghonsku í viðgerðini.

# Krabbameinsfelagið klart til kríggj

**Føroya felag móti Krabbameini fyllir 30 ár, og hevur valt at dagføra sín samleika. Harafturat fer felagið undir nýggja átakið »Føroyar móti Krabba«, ið er ein stór landsinnsavning, ið verður 31. oktober 2009**

KRABBAMEIN
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*




*Urd Johannsen, projektsamskipari í Norðurlandahúsinum, greiðir frá tiltakinum Føroyar móti Krabba, ið verður í Norðurlandahúsinum 31. oktober 2009*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Fólkini úr Sendistovuni hyggja at, meðan nýggi samleikin hjá Krabbameinsfelagnum, sum tey hava sniðgivið, verður sýndur fram fyri fyrstu ferð*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Í mong ár hevur felagið borið navnið á mannamunni. Tó hevur navnið ongantíð verið staðfest - fyrr enn nú. Talan er um Føroya Felag móti Krabbameini, ið nú eftir 30 ár á baki broytir samleika og navn. Nýggja navnið er nú Krabbameinsfelagið.

Tó er talan ikki bert um navnabroyting. Felagið hevur valt at dagføra allan sín samleika við nýggjum búmerki, nýggjum grafiskum samleika, nýggjari heimasíðu og nýggja navninum.

Tað er Sendistovan, ið hevur ment nýggja samleikan saman við Krabbameinsfelagnum.

### Íblástur úti og heima

- Íblásturin til nýggja samleikan er eitt bland millum serføroyskt og útlendskt. Føroyski íblásturin kemur frá heldini, sum eisini var partur av gamla búmerkinum. Heldin er eitt gamalt føroyskt amboð, ið var nýtt í hoyna. Súmbolikkurin er, at heldin er samlandi og verjir tað, ið hon ber, sigur Krabbameinsfelagið.

Tey siga eisini, at kagað hevur verið út í heim, og at sniðgevarnir hava finnið íblástur í universellum súmbolikki, ið eru at kenna frá øðrum búmerkjum, ið hava við krabbamein at gera. Eisini teknið fyri óendaligt og sloyfan eru partur av búmerkinum, og súmbolisera tey ævinleikan.

- Nýggja búmerkið er ein variatión av áðurnevndu heldini, tekninum fyri óendaligt og sloyfuni, sum vit kenna frá heilsufrøðiligum súmbolikki, sigur Krabbameinsfelagið.

Eisini litirnir hava súmbolikk, og siga tey í Krabbameinsfelagnum, at búmerkið hevur eina gongd, sum byrjar við myrkabláum liti, og endar í einum heilt ljósum liti. Hetta súmboliserar, st stríðið móti krabbameini kann vinnast, og harvið er vón fyri framman.

- Litirnir á heldini eru í einum lillaðlittum universi, meðan skriftin er blá. Hetta gevur eitt bland millum tað kvinnuliga og mannliga, sigur Krabbameinsfelagið.

krabbameinsfelagið

# Krabbagalla í Norðurlandahúsinum

**Krabbameinsfelagið setur nú veruliga ferð á í stríðnum móti krabbameini. Saman við Kringvarp Føroya og Norðurlandahúsinum skipa tey fyri Landsinnsavning 31. oktober**

KRABBAMEIN
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Í samband við at Krabbameinsfelagið hevur fingið nýggjan samleika, setur felagið eisini ferð á stríðið móti krabbameini. Krabbameinsfelagið hevur, saman við Kringvarp Føroya og Norðurlandahúsinum, tikið stig til eina landsumfatandi innsavning til frama fyri trý høvuðsumráðir, ið felagið metir átrokandi og viðkomandi at raðfesta.

Tey økini eru Fyribyrging og Upplýsing, Gransking og sjúklingastuðul.

Felagið sigur, at samstarv er fingið í lag við Kringvarp Føroya um at senda beinleiðis frá tiltakinum, og at sendingin verður eitt væl umhugsað bland av redaktionellum tilfari um krabbamein, søgum úr veruliga lívinum, tónlistarligum og listarligum innsløgum, uppboðssølu og kappingum, práti úr salinum og so uppsamling av innkomna stuðlinum.

- Hetta er eitt gott høvi hjá føroyskum fyritøkum at taka lut í og stuðla tí áhaldandi arbeiðnum fyri at fyribyrgja krabbamein í Føroyum. Á hvørjum ári fáa umleið 200 føroyingar staðfest krabbamein, og umleið helvtin tapir dystin móti krabbanum, sigur Krabbameinsfelagið.

Eisini kundu tey avdúka, at tey longu hava fingið nøkur stór nøvn at taka lut á stuðulstiltakinum.

- Vit kunnu longu nú avdúka, at vit hava fingið Føroya Symfoniorkestur, Vígdis Hentze Olsen og Martin Joensen at vera partur av stóra tiltakinum í 31. oktober.

# Kringvarpið eigur at vera við

**Relevansurin í einum slíkum tiltaki er stórur. Hetta er eitt evni, ið viðkemur okkum øllum, hetta er inni í privatsferuni hjá øllum, og tí eigur Kringvarpið at vera við, sigur Herluf Sørensen, programmleiðari**

KRABBAMEIN
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*



*Programmleiðarin í Kringvarp Føroya, Herluf Sørensen, er sannførdur um at Kringvarpið ikki bara eigur, men skal vera við í einum slíkum innsavningartiltaki*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Kringvarp Føroyar verður ein týðandi partur av innsavningartiltakinum, ið verður í Norðurlandahúsinum 31. oktober 2009. Tiltakið skal nevniliga varpast út beinleiðis í fýra tímar.

Kringvarp Føroyar hevur áður verið við í fleiri innsavningartiltøkum, eitt nú í tá Tsunamiin var og til Kosovo.

- Og fólk eftirlýsa ofta, hví Kringvarp Føroya ikki er við í nøkrum slíkum oftari. Men nú kunnu vit so vera við í hesum, og eg haldi at Kringvarpið eigur at vera við í einum slíkum stuðulstiltaki. Relevansurin í tí er stórur, og hetta er øgiliga nær at næstan øllum menniksjum. Vit hava øll onkran, ið er ávirkaður av hesum, og hetta er inni í privatsferuni hjá fólki. Hetta hevur absolutt almennan áhuga, og tí haldi eg at Kringvarpið eigur at vera við í hesum, sigur Herluf Sørensen, programmleiðari í Kringvarp Føroya.